DAGSINS MEINING

Forfjónaði grundlógardagurin

Í gjáramorgunin, grundlógardagsmorgun, stóðu nógv fólk og bíðaðu eftir bussinum á Farstøðini í Havn. Tey flestu skuldu til Danmarkar, og restin fylgdi teim ferðabúnu. Kjaftsvart var í toku og ikki var nógv at sígga annað enn hvønn annan. Tað var grundlógarmorgun og tey flestu høvdu frí, men ikki hoyrdi tú eitt orð grett um, hví tey høvdu frí. Heldur ikki prát um grundlógina og hvussu fræls vit liva undir hesi lóg. Nakrar minuttir frammanundan við Tekniska Skúlan í Havn. Uttanfyri standa nakrir hálvvaknaðir lærlingar og roykja. Teir vita ikki rættuliga, um teir skulu í skúla í dag, tí onkur hevur sagt okkurt um grundlógardag, og merkir tað ikki at man hevur frí, kanska hálvan dag, ella hvussu?

Og burtursæð frá at grundlógardagurin var heilur frídagur hjá alment løntum bólkum í samfelagnum og hálvur frídagur hjá flest øðrum, so fór hann afturvið sum ein vanligur dagur, smidliga og friðaliga, aftur í tíðarinnar hav av livdum døgum. Hesin dagur, sum er grundarlagið undir øllum sjálvsøgdum rætti í samfelagnum í dag, hevur ongantíð verið og er heldur ikki annað enn ein heilt almindiligur frídagur, uttan at fólk hugsa um, hví tey hava frí

Ikki tí, føroyingar eru raskir at halda hátíðardagar í árinum. Vit hittast á Ólavsøku at minnast ein norskan kong, sum fyri 1000 árum síðan fall á Stiklastøðum. Vit minnast hann við gudstænastu og við halgidagaheiti. Vit minnast hann á løgtingi, har tingið verður sett júst hendan dag. Vit minnast hann við skrúðgongu og vit minnast hann við einum kempi balli. Og meðan fólkatómt er á Vaglinum í Havn grundlógardagin, so seta føroyingar stevnu á Vaglinum tjóðardag ísraelsmanna.

Og meðan fólkatómt er á Vaglinum í Havn grundlógardagin, eru flaggdagshøld kring alt landið Flaggdagin. Ein dagur sum hevur nógv minni týdning fyri okkara frælsi í gerandisdegnum enn grundlógardagurin.

Kanska stundin er komin, har vit fara at spyrja okkum sjálvi, hví vit hava frí grundlógardagin. Hví skattaborgarans peningur skal nýtast til, at tey alment løntu fáa frí og hví verkamaðurin ikki hevur fortjent meira enn hálva løn hendan dag? Hetta er ikki bara ein danskur frídagur, sum vit, tí vit tilfeldigvís hava eina danska grundlóg, noyðast at halda saman við dønum. Ella um ikki noyðast, so halda saman við dønum. Hóast føroyingar liva undir donsku grundlógini, so er hon ikki nakað danskt verk sum so. Grundlógin er úrslitið av fleiri hundrað ára frælsisstríði í Europa og sum var í hæddini undir fronsku kollveltingini, har tann fyrsta veruliga grundlógin varð skrivað. Grundlógirnar í Europa eru mest sum avrit av upprunaligu fronsku grundlógini, sum var evnað til petti fyri petti av sveitta, blóði, tárum og ófatiligari líðing.

Grundlógardagurin eigur ikki at fatast sum ein danskur frídagur. Hetta er dagurin, har vit hátíðarhalda, at vit hava rætt at liva í eini frælsari samfelagsskipan. Og sleppa vit trongskygninum eina løtu og hyggja út í heim, so kunnu vit sanna, at tað er ikki ein og hvør í heiminum, sum hevur slík rættindi sum vit. Vit eiga at fegnast um okkara grundlóg, vit eiga at gera dagin eins stóran og aðrar hátíðardagar í landinum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Silvur/kiksilvurblombur í tonnunum er rótin til flestu sjúkur

Olga Hentze

Tvídrátturin millum læknar um dálking vegna kiksilvur heldur fram, hóast eitrandi ávirkanin av hesum varð staðfest í 1926 av læknanum, Alfred Stock. Tannlæknarnir hava kanska sína orsøk at tosa ímóti hesum, men veruleikin er framvegis týðiligur. Kiksilvur er ein av teimum mest eitrandi (ikki geiðslavirki) tungu metallunum, fólk vita um. Grundað á óteljandi granskingar í Svoríki, hevur WHO (Heimsheilsustovnurin) liðkannað ólívrunnin evnir í 1991 og staðfest, at kiksilvur upptakanin er 4 ferðir hægri vegna kiksilvurblombur enn vegna fiskamat. Nødin, sum verður upptikin, er ymisk frá persóni til persón, og dagliga upptøkan er umleið 4 mcg. At tyggja tyggigummi, busta tenn, tyggja mat, nærvera av gullblombum, nýtsla av teldum, økir fleiri ferðir dálkingina frá blombunum. Guva, sum kemur frá kiksilvuri, verður innandað; hon fer yvirum blóð/heila stongsulin og bindur seg til nervavevnaðin. Tað kann geva eina rød av ymiskum eyðkennum, t.d. ymiskar sálarligar trupulleikar, sodningartrupulleikar, svøvntrupulleikar, minka um minnið, tú gerst hvíldarleysur, áhaldandi móð/ur, hevur liðapínu og mangt annað. Hjá barnakonum kann tað lætt hópa seg saman í heilanum, nýrunum og livrini hjá tí ófødda barninum og vísir seg seinni sum sálarligar/atferðartrupulleikar ella evnaveikleiki.

Eyðsýnliga uppliva ikki øll eitrandi ávirkan av kiksilvuri. Í roynd og veru hava øll kiksilvur upphópingar í likaminum frá slíkum fyllingum í tonnunum. Bert tíðin kann siga, hvussu nógvur skaði er hendur við dagliga at hava verið útsettur fyri guvu av hesum fyllingum.

Viðgerð av kiksilvureitran kemur undir læknarøkt, men vanliga ráðgeva tannlæknar ikki at fáa fyllingar burturtiknar, ti vegna fakliga atferð, halda teir, at tað er óetiskt at mæla til at taka fyllingar burtur hjá teimum ikki ovurviðkvæmu persónunum.

Mótvegis tannlækniviðgerðarfeløgunum eru eiturevnafrøðingar og heilivágsgranskarar í ymiskum londum nógv ímóti nýtslu av kiksilvuri. Lars Fibber, leiðarin av eiturevnafrøðingum í WHO-bólkinum, sum kannar ólívrunnið kiksilvur og heilsuárin, hevur staðfest, at hann heldur, at kiksilvur er óhóskandi tilfar at nýta hjá tannlæknum vegna tryggleikan.

Øll, sum hava umsorgan fyri síni heilsu, mega skifta út sínar fyllingar í tonnunum og í staðin fáa sær kiksilvurfríar ikki metal fyllingar. Hetta má bert vera gjørt av tannlækna, sum hevur royndir við hesum og brúkar serliga framferð at taka kiksilvur burtur. Tí, vanligir vælmeinandi tannlæknar kenna ikki til rættan útskiftingarhátt. Fyri at tryggleikin í útskiftingarháttinum kann vera bestur, má ilt vera givið patientinum fyri, at hann ikki skal anda í seg tungt kiksilvurdust, sum kemur frá útboringini. Gummiverja eigur at vera brúkt til at fjala hinar tenninar og at fyribyrgja, at smálutir av fyllingini seta seg á tannkjøtið. Ein serligur boriteknikkur eigur at vera brúktur. Um trygg framferð ikki verður nýtt, er møguleiki fyri eini enn størri kiksilvureitran.

Tær nýggju Targis/-Vevtris plastik fyllingarnar eru eitt betur hóskandi evni og er uttan eitrandi metall.

Fyri at fáa fullfiggjaða starvsfakliga viðgerð, mást tú fara til ein lívfrøðisligan tannlækna, sum ikki nýtir kiksilvur. Hesir eru í Svoríki, Danmark, Onglandi og øðrum londum.

Fólk mugu ikki vænta, at tey beinanvegin eru grødd, aftan á at hava skift fyllingarnar í tonnunum út. Tó fáa nógv fólk tað betur heilsuliga og summi vera frísk. Reinsigongdin kann vara í 1-2 ár. Tilráðandi er at leita sær ráð frá einum starvsfakligum føðsluráðgeva fyri at skunda undir heilsumenningina. Tú kanst fáa kiksilvurstøðið mált í likami tínum við at taka eina hárroynd.

Eg vil mæla til at fara undir eina kiksilvur burturbeining, vitandi at tú tá í hvussu er hevur sloppið tær av við eitt sera eitrandi metall, so tað ikki byggir seg upp í gøgnum tínum og gevur tær heilsutrupulleikar seinni í lívinum.

Um tú ynskir at vita meira, kanst tú seta teg í samband við undirritaðu á tlf. 224258 ella telefaksa til 448659 (Enskt mál um dagin og føroyskt um kvøldarnar og í vikuskiftinum)

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Suðuroyarleiðin og "Fimmarin" 29.05.05

Jaspur Vang
Tvøroyri

Nevnda útvarpssending gav einum varhugan av, at landspolitiska umsitingin og almenni stovnurin,ið hava ábyrgdina av siglingini um Suðuroyarfjørð, tulka løgtingsins vilja politiskt. Spurningurin er tí, um hesir myndugleikar/stovnur kenna sína arbeiðsuppgávu, og ikki taka til sín ein politiskan leiklut, sum teimum ikki tilkemur.

Landsstýrismaðurin føldi trongd til enn einaferð at nýta høvi til at seta Suðuroyarsiglingina í sam- felagsbúskaparligan samanhang, og vísa á, at íløgan í eitt nýtt Suðuroyarskip, er ein stór íløga í mun til samlaða føroyska búskapin. Suðuroyingar flest eru annars av teirri fatan, at løgtingið hevur tikið avgerð um at byggja nýggja skipið. Boðskapurin hjá landsstýrismanninum er tí undrunarverdur.

Jú, væl eru 305 mió. kr. ein stór íløga. Men hyggja vit at hesari ílogu í mun til tær raðfestingar og tann politikk flokkurin hjá landsstýrsimanninum saman við hinum fullveldisflokkunum hevur framt í verki seinastu 4 árini, kunnu vit staðfesta, at niðurskurðurin í blokkinum (367 mió. kr. pr. ár) og vøksturin í rakstrarútreiðslunum til rakstur av yvirtiknu málsøkjunum (á pappírinum aðrar 367 mió. kr. pr. ár), samanlagt gevur eina uphædd uppá uml. 734 mió. kr. pr. ár. Her er í samfelagsbúskap- ligum høpi talan um ein ógvuliga stóran árligan inntøkumiss/vøkstur í rakstrarútreiðslunum.

Føroyska samfelagið kundi nevniliga keypt og goldið tvey Suðuroyarskip pr. ár fyri samlaðu upphæddina. Yvir eitt 4-ára valskeið høvdu samlaði inntøkumissurin og hækkaðu rakstrarútreiðsl- urnar, verið nóg mikið til at rinda fyri bæði eitt Suðuroyarskip og tunnlarnar undir Vestmannasund og Leirvíksfjørð.

Tað skal flytast nógvur fiskur um firðir og sund, um vit vilja varðveita vælferðina og árliga vinna inn aftur oman fyri nevndu 734 mió. kr. pr. ár. Tí hevur løgtingið álagt landsstýrismanninum og Strandfaraskipum Landsins at skipa fyri nøktandi ferðafólka- og farmaflutningi í okkara oyggja- samfelag. Skulu vit seta samferðsluna millum oyggjarnar í samfelagsbúskaparligan samanhang og tosa um politiskar raðfestingar, so lat okkum gera til fullnar.

Annars vóru landsstýrismaðurin og umboðið fyri Strandfaraskip Landsins ógvuliga samdir um, at heimsmarknaðurin fyri ferjur, egnaðar at leiga til Suðuroyarleiðina, er avmarkaður. Suðuroyingar minnast væl, at landstýrismaðurin, eftir at Strandfaraskip Landsins hevði kannað heimsmarknaðin og handaði landsstýrismanninum tilmæli um at byggja nýtt suðuroyarskip, fekk tilboð um at keypa "Norrønu", og at landsstýrismaðurin kom til tað niðurstøðu, at tað var ábyrgdarleyst, ikki at viðgera tilboðið frá "Smyril Line" landspolitiskt. Tá spurdi mangur suðuroyingur seg sjálvan, hvørt tað var Strandfaraskip Landsins, ið hevði leitað ov illa, ella um tað var landsstýrismaðurin, ið hevði betur eygu enn serkunnleikin.

Umboðið fyri Strandfaraskip Landsins kundi ikki lata vera við at viðmerkja, at suðuroyingar (hann hugsar væl føroyska samfelagið) miðskeiðis í 1970-unum (fyri 30 árum síðani) fingu "eitt ógvuliga fínt skip".Hvat umboðið fyri Strandsfaraskip Landsins vildi við hesari politisku viðmerking, og hvussu viðmerkingin skuldi tulkast, veit eg ikki rættiliga, og fari eg tí at lata tað liggja.

Heldur ikki kundi umboðið fyri Strandsfaraskip Landsins lata vera við at viðmerkja, at "Smyril, einans er ov lítil til farleiðina fáar ferðir um árið. Um nevnda umboð tosar um kapasitetin í samband við farma- og ferðafólkaflutning og sjódygd, økismenning, ella um umboðið ger sær tankar um framtíðartørv og menning av oyggjasamfelagnum sum heild, veit eg ikki.

Samanumtikið er tó at vóna, at omanfyri nevndu politisku viðmerkingar frá almennum stovni og umsitingarliga landsmyndugleikanum, ikki hava ávirkan á dagliga raksturin av Suðuroyarleiðini, og at spurnartekin ikki verður sett við, hvat løgtingsins vilji er og tað sum í lógini um fólka- og farmaflutning verður nevnt nøktandi flutningur.

Samstarv um løgfrøði

Søgu- & Samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum og Lagadeild Háskola Islands hava skrivað undir eina yvirlýsing um samstarv um løgfrøðiliga útbúgving og løgfrøðiliga gransking.

LØGFRØÐIÚTBÚGVING
Søgu- og Samfelagsdeildin

Undir grundlógararbeiðinum í Grundlógarnevndini kom fram, at stórur tørvur er á hollari lógfrøðiligari vitan, serliga um Føroyar skulu yvirtaka rættarmál. Føroysk lóggáva, siðvenja hjá dómstólum og fyrisiting kunnu ikki ganga sínar egnu leiðir uttan lógkøna gransking, kunning og frálæru. Um ein føroysk grundlóg skal kunna gerast virkin, er tað avgerandi neyðugt at vit fáa eina livandi og áhaldandi fakliga viðgerð av føroyskari lóggávu. Hetta tí:

- Føroyar eru egið lógarøki við egnum lógum og egnari praksis á flestu økjum.
- At Føroyar hava – fullveldi ella ikki – ábyrgd av flestu málsøkjum.
- At Føroyar hava eina ov lítið menta almenna fyrisiting.
- At skal stjórnarskipanin vera virkin og hava týdning fyri trivnaðin og trygdina hjá fólki í Føroyum, mugu fortreytir skapast.
- At í skúlunum og innan hægri útbúgving má frálæra vera í okkara egnu stjórnarskipan.
- At rættarskipanin skal lagast til og vera ein meira virkin partur í rættarfatanini og rættarskapanini. Avgerðir hjá dómstólum, umboðsmanni, myndugleikum og kærumyndugleikum mugu savnast og vera atkomulig hjá øllum.
- At avgerandi fyri føroyskum ræði á teimum ymisku málsøkjunum eru føroysk rættarvísindi, gransking og útbúgving í føroyskari stjórnar- og rættarskipan á teimum einstøku málsøkjunum.

Tørvin á størri virknum kunnleika um lóg eru ikki minst ungir løgfrøðingar greiðir yvir. Teir hava nú í eina tíð givið út eitt áhugavert føroyskt lógarrit. Eisini landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum hevur sýnt málinum áhuga, og kallaði 27. oktober 2000 inn til ein fund um henda spurning. Formaðurin í Grundlógarnevndini, Jóan Pauli Joensen og skrivarin Kári á Rógvi, arbeiddu við málinum.

13. oktober 2001 skipaði Fróðskaparsetrið fyri eini verkstovu um tørvin á undirvísing og gransking, har eisini fleiri umboð fyri Løgfrøðideildina á Háskola Islands luttóku saman við føroyskum løgfrøðingum. Hetta var ein sera áhugaverd verkstova.

Tað eru sjálvandi ymiskar meiningar um, hvussu útbúgvingin í løgfrøði í Føroyum skal skipast, men tað sum higartil hevur verið í uppskoti er ein eitt ára grundútbúgving og so ein sokallað mastersútbúgving upp á 1 til hálvtannað ár.

Fyrsta tiltakið hjá Søgu- & Samfelagsdeildinini hevur verið at skipa fyri einum lítlum grundskeiði í lóg. Tey sum hava staðið fyri hesum skeiði eru teir ungu løgfrøðingarnir Kári á Rógvi, Birta Biskopsstøð, Jógvan Elias Winther Poulsen og Jonhard Klettheyggj. Hetta skeið hevur havt heilt stóra undirtøku millum fólk og er sera væl umtókt av teimum lesandi. Eini 30 fólk fara upp til prøvtøkuna sum verður 3. juni.

Tað sum Søgu- & Samfelagsdeildinin og Lagadeil Háskola Island eru vorðnar samdar um er:

- Lagadeild býður sær til í eini innleiðslutíð at hjálpa til at leggja eitt grundskeið í føroyskari løgfrøði til rættis og tryggja, at undirvísing og prøvtøkur eru á einum nóg høgum støði.
- Lagadeild býður sær til at lata lærarar á deildini taka lut í undirvísingini í løgfrøði á Søgu- & Samfelagsdeildini og vegleiða teimum føroysku løgfrøðingunum, sum skipa fyri undirvísingini.
- Lagadeild býður sær til at hjálpa til við at fyrireika eina mastersútbúgving í føroyskari løgfrøði í samstarvi við Søgu og samfelagsdeildina og tryggja, at undirvísing og eftirmeting eru á nóg høgum støði.
- Lagadeild býður sær til at taka ímóti lesandi, við taka mastersútbúgving til at fullgera seríoki í mastersútbúgvingini vil Lagadeild í evnum sum Lagadeild í evnum sum Lagadeild hevur serkunnleika í.
- Fróðskaparsetur Føroya býður sær harafturímóti at samstarva við Háskola Islands á øðrum økjum, har tørvur er á tí og á løgfrøðiøkinum, tá tann parturin er komin undan.

Søgu- & Samfelagsdeildin er fegin um hesa hjálpandi hondina frá Lagadeild Háskola Islands og vónar, at deildin fær teir hølisligu og fíggjarligu karmar, sum ger tað møguligt at taka ímóti hesum frálíka tilboði.

Føroysk tíðindafólk ov vánalig?

Odmar Kúrberg

Eg hugsi hvønn dag um føroysku tíðindafólkini eru korrupt ella bert ótrúliga vánalig, tað er ongatíð settur spurningur við hvat gera føroysku fólkatingslimirnir, og um tað er til gagns fyri Føroyar og føringar.

Vit kundu tikið eitt dømi: Invalidapensionin, ella sum danir kalla tað »førtidspension«, kann útgjaldast í londum runt um Danmark, t. d. Noreg, Svoríki, men ikki í Føroyum, og hví, tí Jóannes Eidesgaard stemmaði ímóti.

Tá man hugsar um, at hettar ikki hevði kostað føringum eina krónu, tá tað verður danski staturin, sum til eina og hvørja tíð skal gjalda.

Ja hattar kallar man gott arbeiði, føringum at frama.

Ricardo Villar vitjar í Føroyum

Argentinski saksofonisturin Ricardo Villar vitjar í Føroyum í juni

KONSERT
Tutl

Hann fer at hava konsertir saman við tónleikarunum í Shalder: Heðin Ziska Davidsen, Braduri Jacobsen og Mikael og Kristian Blak.

Fyrsta framførsla var á gamla Meiarínum mánakvøldið, har Ravnating við ljósmyndum eftir Philippe Carré vóru at hoyra og síggja.

Harafturat fer Ricardo og Shalder at spæla ymsastaðni í Havn og á bygd - og eisini á fleiri Helliskonsertum. Konsertferðin endar við luttøku á Summartónum 17. juni.

Shalder var á konsertferð í Argentina í februar 2002, og tá var júst Ricardo Villar við í bólkinum, sigur plátufelatgið Tutl.